# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Óluva vann bilin




Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil handar hepna vinnaranum, Óluvu Zachariasen, Skoda bilin

Ein Skoda Fabia Combi Sport var høvuðsvinningur á lutaseðlunum hjá ítróttarfelagnum EB/Steymi, sum vórðu trektir tann 6. november. Hepni vinnarin gjørdist Óluva Zachariasen á Eiði, sum hevði seðil nr. 5126.

Tað eru nokk fleiri, sum hava lagt til merkis, at leikarar og venjarar hjá EB/Streymi koyra í bilum frá Norðbil. Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil sigur, at ein orsøk til at hann stuðlar EB/Streymi er, at hann er giftur inn í eina familju í Streymnesi, har øll er EB/Streyma fjepparar.

Ítróttarfelagið EB/Streymur takkar øllum, sum hava stuðlað felagnum við at keypa lutaseðlar.



*Birgir Dam Jacobsen (h.m.) saman við verfaðir sínum Steingrím Magnussen. Fremst á myndini eru Fríði, sonur Hallur Holm, bókhaldara hjá Norðbil, og Martin, sonur Birgir Dam Jacobsen*

# Hátíðarhald í Wolfsburg




*Starvsfólk hjá Volkswagen í Wolfsburg við jubileumsbilunum - einum bláum VW Golf*

Mikudagin 22. desember 2010 var hátíðarhald á týsku Volkswagen bilverksmiðjuni í Wolfsburg í sambandi við at VW bilur nr. 111.111.111 koyrdi av samlibandinum.

Hetta er tað samlaða talið av VW bilum, sum hava verið gjørdir síðan framleiðslan av VW bobluni byrjaði í 1938. Talan er bert um VW bilar. Ikki onnur bilmerkir hjá VW-konsernini sum t.d. Audi, Skoda og Seat.

Hósdagin 13. januar kl. 17.15

Í sendingini verður vitjað á bilasøluni Ivan Bilum við Hoyvíksvegin, har ein Mitsubishi ASX verður royndarkoyrdur saman við Magnusi Egholm sølumanni.

Í vinnuinnslagnum verður vitjað hjá Bygma Balslev í Hoyvík, sum letur tveir nýggjar handlar upp leygardagin 15. januar. Í hesum sambandi eru samrøður við Sólbjørn Thomsen um handilin, sum hevur alt innan gólv, og við Áka Mortensen um HVS-handilin HITI, sum nú er partur av Bygma Balslev.



Áki Mortensen
Sólbjørn Thomsen
Magnus Egholm

Vinnu- & bilradío á Rás 2